INNLATING Í STØDDFRØÐI

Nr. 2



7. a.

Latast inn: 20.03.23

(G.G. Innlatingin skal latast inn í leysum, puntaðum A4 ørkum og í einum plastlumma. Minnist til at skriva navn á allar síðurnar í innlatingina.
Sera týðandi at minnist til millumrokningar)

STØDDFRØÐI INNLATING

at lata inn: týsdagin 20.03.2023

Nr. 3

(G.G. Innlatingin skal latast inn í innlatingarheftinum ella verða í leysum, puntaðum A4 ørkum og í einum plastlumma. Minnist til at skriva navn á innlatingina. Minnist til millumrokningar)

1. Handilsrokning, tíð og pengar:

Mamma Árant hevur havt bindiklubb. Hon biður Árant vaska upp eftir bindiklubbin.

Uppvaskið:	
Tólv	Gløs
Tólv	Tallerkar
Tólv	Skeiðir
Tvær	Stórar skálir
Tólv	Gaflar
Seks	Koppar
Seks	Krúss
Tvær	Ovnsplátur
Tólv	Lítlar skálir
Ein	Grýta

Árant vildi vita, hvussu leingi tað fór at taka honum at vaska upp. Hann hevði roknað út, at tað tók fimm minuttir at vaska eina grýtu ella stóra skál. Tjúgu sekund at vaska eitt glas ella kopp, meðan eitt krúss tók tretivu sekund. Ein lítil skál tók tveir minuttir. Ein ovnspláta fjúrtan minuttir. Hálvtrýss sekund at vaska ein tallerk og tíggju sekund at vaska ein gaffil ella skeið.

a.) Hvussu nógvar minuttir tók tað at vaska upp?

b.) Hvussu nógvar tímar tók tað at vaksa upp? (desimaltal)

Árant hevði fingið lovað frá mammuni, at hann fekk 110 kr. um tíman at vaska upp.

c.) Hvussu nógvar pengar fekk Árant fyri at vaska upp fyri mammuna.

Árant mátti tó gjalda 20 % í skatti til pápan.

d.) Hvussu nógv skuldi Árant gjalda í skatti til pápan?

e.) Hvussu nógv hevði Árant eftir, tá ið hann hevði goldið skatt til pápan?

Mamma Árant og tær 11 bindiklubba vinkonurnar høvdu etið 42 bollar.

f.) Hvussu nógvar bollar ár, hvør teirra í miðal?

2. Algebra og bókstavarokning

Umstytt framsagnirnar

a.) **12a + 4b - 8a + 5b - 14b**

b.) **12a - 6(3 - a) + 8**

c.) **-12a - 2(4 - 6a) + 21**



Loys líkningarnar

d.) **5x + 5 = 25**

e.) **2(2x + 8) = 84**

f.) **5x - 5 = 2x - 20**

Lív keypir ein bommpakka, sum kostar 14 kr, og 3 bananir. Jacoba keypir 5 bananir. Tær gjalda líka nógv.

g.) **Hvat kostar ein banan? - skriva eina líkning, sum kann loysa spurningin.**

3. Geometri

Ein tríkantur hevur krosstølini: A = (2,5) B = (2, -3) C = (-4,5)

a.) **Tekna tríkantin ABC í eina krossskipan (*cm sum eind*)**

b.) **Hvussu stórir eru vinklarnir í tríkantinum?**

c.) **Rokna víddina á tríkanti ABC**

d.) **Tekna <u>umskrivaða</u> sirkulin**

e.) **Rokna ummálið á umskrivaða sirklinum?**

f.) **Tekna <u>innskrivaða</u> sirkulin**

g.) **Hvat er tvørmátið á innskrivaða sirklinum?**

4. Vídd og rúmd

Ingi skal leggja flísar á eitt stykki, sum sær út, sum myndin vísir.





Hvør flís er 25 cm long, 25 cm breið og 5 cm tjúkk.

a) **Rokna víddina á stykkinum**

b) **Rokna víddina á einari flís**

c) **Hvussu nógvar flísar skal Ingi leggja á?**

Á einum platti av flísum eru 50 flísar.

d) **Hvussu nógvar plattar skal Ingi keypa?**

Evnisnøgdin á flísunum er 2,9 g/cm^3.

e) **Hvussu stór er rúmdin á einari flís?**

f) **Hvussu nógv kg viga allar flísarnar, sum Ingi leggur? (ein desimal)**